# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI BYGGING AV ÍBÚÐUM Á MATR. NR. 253o, 253p OG 253n ÚTI Á FLØTUM Á SKÁLA




Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa økið matr. nr. 253o, 253p og 253n Úti á Fløtum á Skála til íbúðarbygging.

Fyri viðurskifti, sum ikki eru skipaði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu galdandi.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 At grundstykkini matr. nr. 253o, 253p og 253n Úti á Fløtum á Skála verða løgd saman til íbúðarbygging.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. Mars 2013.

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1.

2.3 Økið er uml. 2.400 $m^2$ til støddar og liggur sambært almennu byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu í B18-øki.

2.4 Sambært kap. VIII, 2. gr í almennu byggisamtyktini, er umráðisparturin B18 lagdur til sethúsabygging. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt náttúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Bygging av íbúðum og tilhoyrandi parkeringsplássi

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 18 íbúðir á 64 $m^2$ bruttovídd.

4.2 Byggjast kann ein bygningur í 2 hæddum, sum í mesta lagi er 67 m langur, 9 m breiður og 6,5 m høgur

4.3 Eisini kunnu byggjast uppgongdir og goymslur fram við allari longdini av bygninginum í eini breidd uppá í mesta lagi 2,5 m

4.4 Leiðingar í geiranum ímillum 253n og 253o verða, av byggharranum, leiddar í ein útlagdan geira ímillum 253p og 253q

## § 5. PARKERING

5.1 Byggiharrin skipar parkeringspláss til í minsta lagi 27 bilstøðlar lutvíst á byggiøkinum 253n, 253o og 253p og vestan fyri vegin úti á Fløtum matr. nr. 253ø.

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

6.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Runavíkar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

7.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

7.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.